

# Hugtakandi og øðrvísi myndir úr Føroyum




*Bókin »Forbi Færøerne« hjá myndamanninum Per Folkver er hugtakandi og full av gerandismyndum úr Føroyum. Her eru fólk. Fólk til arbeiðis, fólk heima, fólk , ið hava frí. Kend og minni kend andlit. Gerandistos uttan orð*

**Gløgt er gestsins eyga, verður tikið til. Og tað er óivað mangan prógvað. Nú er lagt afturat prógvgrundarlagnum við bókini hjá danska myndamanninum Per Folkver, ið hevur vitjað í Føroyum. Burturúr er komin myndabók við hugtakandi, litríkum myndum, ið tó eru heldur øðrvísi, enn tær vit vanliga síggja**

UMRØÐA
*Dagfinn Olsen*

Myndamaðurin Per Folkver hevur fingið myndir sínar úr Føroyum út í bók. Hetta eru myndir, sum hann hevur tikið á vitjanum í Føroyum frá 1994 til 2000.

Her skal ikki gerast ein fátækslig roynd at ummæla, men heldur skal bókin ummrøðast.

Tí slík bók hevur nevniliga tann eginleika, at orð verða gjørd til einkis. Her eru tað myndirnar, ið tala.

### Øðrvísi

Føroyingar duga ofta best at vísa Føroyar, sum eitt land, har einki menniskja býr, har eingir bilar eru og har hús ikki eru uppfunnin enn. Í hvussu er ikki hús við nýmótans sniði og øðrum enn grasi á tekjuni.

Soleiðis er veruleikin ofta lýstur í ferðavinnufaldarum. Lundar, fjøll og seyður! So einfalt er tað!

Danir hava eitt fyribrigdi, ið teir nevna ”folkesjæl”. Kanska er tað júst føroysku fólkasálina, ið danin Per Folkver hevur givið út í bók.

Her skorta í hvussu er ikki lív, fólk og veruleiki. Og tað er tað, ið ger myndirnar so øðrvísi, góðar, gerandisligar og harvið veruligar. So vælsignaða veruligar, gerandissligar og flottar. Flottar, tí eisini sæst, at her er talan um listarligt virði og gott hondverk.

Her síggjast føroyskir ungdómar eitt púra vanligt, váttligt vikuskiftiskvøld.

Her eru fólk. Fólk til arbeiðis, fólk heima, fólk , ið hava frí. Kend og minni kend andlit. Gerandistos uttan orð.

Vit síggja máleran, ið stríðist við altartalvuna, meðan modellið tolið hongur á krossinum. Vit síggja seymikonuna, føroyska dansin, møti og bønarstund, stevnufólk og fólk, ið tekst við tað, ið føroyingar nú einaferð takast við.